# Fótbóltsfepur

**Fleiri av spælarunum á føroyska landsliðnum liggja sjúkir í Luksemburg**

Landsdystur
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk úr Luksemburg*

Tað er ikki sørt, at landsliðsvenjarin, Allan Simonsen, hevur nóg mikið at hugsa um, nú hann skal gera av, hvørjir ellivu skulu byrja inni, tá føroyska landsliðið fer á vøllin leygardagin.

Sjúka ger í løtuni rættiliga nógv um seg í landsliðsleguni, og hetta ger, at tað er nakað langt ífrá, at Allan kann senda sítt ynskislið inn á vøllin.

### Klaksvíkálop

Hvussu støðan er, tá lesarin hevur blaðið í hondini, er ilt at siga, men hóskvøldið stóð í øllum førum einki serligt til. Ikki færri enn tríggir spælarar eru í løtuni í seingini, og í øllum førum mugu tveir teirra vanliga roknast millum fremstu evnini í byrjunaruppstillingini.

Longu áðrenn farið varð úr Vágunum mikudagin, var greitt, at tað ikki stóð nakað serligt til við Una Arge. Influensa hevur rakt vandamikla framherjan, og hann hevur so heldur ikki verið við til tær venjingar, sum landsliðið hevur havt higartil. Undan evstamarki okkara varð tosað um, at Uni møguliga fer heim til Føroya, tá liðfelagarnir fara heim.

Tí má tað metast sum sannlíkt, at tað hesa ferð verða tveir klaksvíkingar, sum fara at manna føroyska álopið leygardagin. Todi Jónsson hevur nakað av bruna í einari tá, men spælir heilt víst við, og ivaleyst fer hann at hava Kurt Mørkøre við liðina, tá farið verður á vøllin.

### Miðvøllurin hart raktur

Umframt Una Arge, eru eisini tveir aðrir spælarar sjúkir, og fyri báðar er galdandi, at teir helst skuldu spælt á miðvøllinum, um teir ikki vóru sjúkir.

Sámal Joensen hevur longu í fleiri ár talst millum føstu fúsirnir hjá Allani Simonsen, men roknast kann so ikki við, at hann eigur pláss á liðnum hesaferð, nú influensan ger um seg.

Av teimum leikarum, sum eru við í hópinum, er Fróði Benjaminsen helst tann, sum líkist mest upplagda avloysaranum hjá Sámali. Nú støðan so tann, at Fróði eisini er sjúkur, og tí tykist júst sentrala miðvallarplássið at vera størsti spurningurin undan leygardegnum. Pól Thorsteinsson kundi ivaleyst røkt sessin, men leikbann hansara viðførir sjávsagt, at hann ikki er tøkur, fyrr enn til dystin móti Russlandi. Allan Mørkøre og Jens Kristian Hansen hava eisini røkt sessin áður, men sum kunnugt eru teir heldur ikki tøkir.



*Tað er ikki løgið, um Allan Simosen er í døpurhuga. Tríggir av spælarum hansara liggja sjúkir í løtuni, og verða tí helst ikki tøkir leygardagin*

Tað tykist tí sannlíkt, at talan verður um eina nýggja samanseting á miðvøllinum. Júst hvør hendan verður, er ilt at siga, men allar helst verður talan antin um Jóhannis Joensen ella Johan B. Hansen. Triðji møguleikin er at taka Kurt Mørkøre aftur á miðvøllin, men ivaleyst ætlar Allan Simonsen at nýta hann í álopinum.

# Óhapp koma altíð fyri

**Hóast landsliðið hevur havt trupulleikar við fyrireikingunum, so heldur Allan Simonsen ikki, at hetta er gjørt fyri at órógva føryska liðið**

Landsdystur
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk úr Luksemburg*

Tað er ikki sørt, at føroyska landsliðið hevur havt trupulleikar í fyrireikingunum til landsdystin móti Luksemburg.

Sum kunnugt hevur sjúka í ólukkumát gjørt um seg, og harumframt hava eisini verið trupulleikar við venjingini.. Sostatt varð venjingin hóskvøldið flutt tvær ferðir, bóltar vóru ikki tøkir og so framvegis.

Tað er næstan soleiðis, at tú fært varhugan av, tað er tilvitað, at venjingarumstøðurnar ikki eru av teimum bestu. Eins og vertirnir við vilja royna at órógva fyrireikingarnar hjá okkara monnum.

Allan Simonsen er tó ein royndur harri. Gjøgnum tíð sína í europeiskum stórfeløgum, hevur hann verið við til eitt sindur av hvørjum. Hann letst heldur ikki á nakran hátt at vera ávirkaður av væntandi fyrireikingunum, og sjálvur sigur hann eisini, at talan helst bara hevur verið um nøkur óhapp hjá vertunum.

- Eg rokni ikki við, at tað á nakran hátt er soleiðis, at teir við vilja royna at órógva okkum. Í dag máttu vit flyta venjingina, tí vøllurin, sum vit ætlandi skuldu nýta, var undir í vatni.

- Eg dugi ikki á nakran hátt at síggja, at teir við vilja ætla at órógva okkum. Tað dugi eg sum so heldur ikki at síggja nakra orsøk til, og eg ivist ikki í, at tað frá teirra síðu er talan um fair-play. Eg trúgvi ikki uppá, at nakað annað ger seg galdandi, sigur landsliðsvenjarin.



*- Næsti dysturin er altíð tann týdningarmesti, sigur Allan Simonsen um týdningin av dystinum móti Luksemburg*

### Komandi uppgávan telur mest

Tað er annars einki at ivast í, at tey í Luksemburg leggja alla orku í at vinna dystin móti Føroyum. Her hava teir ein møguleika at spæla móti eini tjóð, sum á pappírinum er veikari, og ivaleyst vilja hvørki áskoðarar, spælarar ella venjarar hava eitt tap sitandi á sær, tá dysturin er liðugur.

Støðan hjá okkara monnum er tó ík mangar mátar lík teirra. Fleiri rokna dystin leygardagin fyri at vera tann týdningarmesta á árinum, men heldur ikki hetta tykist á nakran hátt at órógva Allan Simonsen.

- Næsti dysturin er altíð tann týdningarmesti. Tað er so sera einfalt við tí.

- Annars er Luksemburg jú eitt land, sum vit hava hug at sammeta okkum við, tá talan er um fótbólt. Gaman í búgva her tíggjur ferðir so nógv fólk, sum í Føroyum, men vit hava jú áður megnað at fingið góð úrslit móti størri londum,

- Tað er allar helst soleiðis, at tað verður tað liðið, sum hevur rætta dagin, sum vinnur. Tíverri eru vit har raktir av sjúku í løuni, men tað er so nakað, sum vit bara mugu taka við. Tað er bara at vóna, at tað ikki verða fleiri leikarar, sum verða raktir av sjúkuni, tí støðan nú er ring. Eisini hava vit tveir smærri skaðar at dragast við, men tað verður helst í lagi, sigur venjarin, og sipar við hesum til Toda Jónsson og Óla Johannesen. Todi hevur bruna í einari tá, meðan ÓIi hevur eina eyma hælsinu.

Tá tygara útsendi at enda sigur við venjaran, at gaggur eru við í viðførinum, sigur hann flennandi, at tað eru fleiri, sum hava boðið seg til.

- Tað verður so helst ikki nakar trupulleiki at fáa ellivu mans til dystin, men vit mugu bara vóna, at alt fer at laga seg. Eisini hóast sjúka og annað ger um seg.



# Neistin fer eftir bronsuni

**Tveir dystir vera í 1. deild hjá monnum, meðan fýra dystir vera í fremstu kvinnudeildinin um vikuskiftið. Hjá monnunum skal Neistin taka ímóti nýkosnu føroyameistarunum úr Vestmanna, og Neistin skal vinna fyri at røkka triðja plássi. Hjá kvinnum er kanska størri spenningur í botninum enn í oddanum**

Hondbóltur
*Stefan í Skorini*

Mansliðið hjá VÍF tryggjaði sær seinasta mikukvøld føroyameistaraheitið, tá liðið vann á KÍF í Vestmanna. Nú hevur liðið sum so einki annað at spæla fyri enn heiðurin, tí gullið er í hús.

Hetta kann koma Neistanum til góðar, sum enn hevur møguleika fyri at vinna bronsumerkini. Sunnudagin møtast Neistin og VÍF í høllini á Hálsi. Liðið er trý stig aftanfyri grannarnar úr Kyndli, men Neistin hevur spælt ein dyst færri. Um teir megna at basa VÍF, so stendur stríðið um bronsumerkini púra opið. Tað er tó ikki væntandi, at VÍF fer at taka sær av løttum móti Neistanum, tí tað vóru havnarmenninir, ið tóku meistaraheitið frá vestmenningum í fjør.

Hin dysturin verður millum KÍF og H71 í Vestmanna sunnudagin. Hoyvíkingar kunnu ikki kenna seg tryggar, tí Tjaldur er bara tvey stig aftanfyri á aftasta plássi. KÍF hevur hinvegin so gott sum tryggjað seg ímóti at enda aftast.

### Spenningur í botninum

Tað hevur leingi verið greitt, at VÍF eisini fer at vinna føroyameistaraheitið hjá kvinnunum. Tær eru í løtuni átta stig frammanfyri Stjørnuna á øðrum plássi. Hinvegin er størri spenningur um seinastu plássini, og hvør fer avstað við bronsumerkjunum.

Niðast liggja Søljan og Tjaldur við fýra stigum í part, men vágakvinnur hava spælt ein dyst fleiri.

Søljan tók fríggjakvøldið ímóti Neistanum, og sunnudagin skulu tær til Vágs at spæla sín næstseinasta dyst í hesum kappingarárinum. Seinasti dysturin verður á heimavølli móti Tjaldri, og tað verður óivað ein spennandi botndystur.

Neistin hevur ein góðan møguleika at vinna bronsumerkini. Tær eru fýra stig aftan fyri VB, men Neistin hevur tveir dystir til góðar. Um neistakvinnur gera sítt ítarsta, er møguleiki fyri bronsuni.

Leygardagin spæla Kyndil og Stjørnan í Havn. Stjørnan hevur enn ikki tryggjað sær silvurmerkini, men tær hava góð kort í hondini til tess. Ein sigur á Kyndli hevði mestsum ognað teimum silvur.

Kyndlakvinnur hava ikki stórt annað at spæla fyri enn at sleppa undan botnsessinum. Heiðursmerkini eru farin úr eygsjón, men tær skuldu megna at sleppa undan aftasta sessinum, sum Tjaldur og Søljan eru fremstu kandidatar at taka.



H71 – Neistin 20-29 (12-17)

# Neistin vann sannførandi

**Neistin vann sannførandi á grannunum úr Hoyvík hóskvøldið. Neistin eltir Kyndil á triðja plássi og nú er bara eitt stig millum arvafíggindarnar**

Hondbóltur
*Stefan í Skorini*

Tað eydnaðist Neistanum uttan stórvegis trupulleikar at basa H71 við átta málum. Munurin var fimm mál í hálvleikinum, og H71 megnaði ikki at minka um munin eftir steðgin. Ístaðin økti Neistin uppí átta mál.

Tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin dróg Neistin so spakuliga frá hoyvíkingum, sum ikki megnaðu at fylgja við. H71 er nú í vanda fyri at enda á niðasta plássi, tí Tjaldur er bara tvey stig aftanfyri.



### Dysturin í tølum

Málskjúttar:

H71: Halgir D. Olesen 6, Johnny Durhuus 4, Jákup Símun Simonsen 3, Rolf Mouritsen 2, Agnar Højgaard 2, Rene D. Olesen 1, Olaf Vestergaard 1, Janus Joensen 1

Neistin: Jacob Jónsson 6, Rune Møller 5, Kári Mortensen 5, Áki Mørk 4, Helgi Justinussen 3, Karl O. Rasmussen 2, Jákup Sverri Kass 1, Rani Slættanes 1

Brotskøst: H71 2, Neistin 2

Útvísingar: H71 3,
Neistin 2

Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

## Flogbóltskapping á Giljanesi

Dráttur skipar um vikuskiftið fyri flogbóltskapping fyri tey eldru liðini í høllini á Giljanesi. Umleið 40 lið hava boðað frá luttøku til hetta flogbóltsvikuskiftið hjá Drátti.

Byrjað verður leygarmorgunin klokkan 9.30 og spælt verður allan dagin. 2. deild hjá monnum og kvinnum spæla fyrrapart, meðan liðini í 1. deild og meistaradeildini fara á vøllin seinnapart.

Allar kappingarnar uttan meistaradeildin verða avgjørdar leygardagin, og Formula.Fo letur heiðurstekin til vinnararnar.

Eitt lið av føroyskum spælarum í Danmark hevur boðað frá luttøku í meistaradeildini hjá monnum. Hetta liðið sær út til at vera væl fyri við millum øðrum Sigmundi av Teigum og Bárði Mikkelsen við á liðnum.

Dráttur skipar eftir kappingarnar leygarkvøldið fyri dansi í Sørvágs Bio, har B &Z spælir. Bussur koyrir millum bygdirnar eftir dansin.